– trygt og ómakaleyst til hús



INNI

# Nýggjar frálíkar íbúðir undir Kongavarða á 82 m²

**Nú hevur tú møguleikan fyri at ogna tær hesar frálíku íbúðirnar, vart tú ov sein/ur í fyrsta umfari.**









## Umhvørvið

Íbúðirnar, sum eru í einari hædd, eru við endan á Kongavarðavegnum í átta samanbygdum íbúðarhúsum við trimum íbúðum í hvørjum, sum verða bygd á fundamentið, ið annars var ætlað til raðhús í 3 hæddum. Íbúðirnar verða bygdar í somu haldgóðu dygd, ið longu er galdandi fyri restina av byggjarínum undir Kongavarða, og tær hava líka so einastandandi og framúrskarandi panoramaútsýni yvir Havnina, fjøllini norðanfyri, út á fjørðin norðureftir og yvir á Nólsoynna.

## Íbúðirnar

Íbúðirnar er eins væl egnaðar til ung sum eldri, til støk eins og til tað lítlu familjuna. Íbúðirnar í miðhæddini eru sera væl egnaðar til fólk, ið eru rørslutarnað, tí tú kanst ganga / koyra beint inn. Alt er nýtt og hvítt og gjørt við besta handverki og úr besta tilfari. Íbúðirnar eru hugnaligar, liviligar og væl bjálvaðar. Útveggirnir eru úr bjálvaðum betonelementum, og brandmúrur úr beton er millum húsini og dekk úr beton er millum hæddirnar. Gólvini í duri og baðirúmi eru løgd við flísum, og øll onnur gólv eru løgd við parkett. Íbúðirnar eru lættar at umsita og halda, og eru sera bíligar í rakstri.




## Innrætting

Har er inngongd, durur / gongd, hjúnarrúm, kamar, baðirúm og køkur / alrúm / stova. Ovastu íbúðirnar hava atgongd til ovastaloft, og niðastu íbúðirnar hava útgongd til útigólv / terassu. Allar íbúðirnar hava hartil goymslurúm / hjall á uml. 4 m².

## Fakta

**Adressa** ........... undir Kongavarða, Argir
**Byggiár** ............ 2010
**Hæddir** ............. 1
**Gólvvídd** ........... 82 m² + 4 m²
**Goymslurúm** .... 4 m²
**Prísur** ............... úr kr. 1.600.000,00 íroknað mvg*

*) harav kr. 100.000 kunnu fáast aftur eftir umsókn





PF inni
Niels Finsensgøta 37
Postboks 364
FO-110 Tórshavn
Telefon 35 42 00
inni@inni.fo

Sí fleiri hús á **inni.fo**